# VÆLKOMIN TIL FØROYAR

**NÚ TÚ FERT Í 14 DAGAR HEIMAUPPIHALD**

- Tú ert heima við hús og kanst vera saman við familjuni.
- Tú fært ikki vitjan.
- Skalt tú arbeiða, skal tað gerast heimanifrá.
- Tú kanst fara túr í egnum bili og vera úti í náttúruni, har onnur ikki eru. Halt teg frá øðrum.
- Minst til eisini at halda frástøðu og hava gott reinføri, tá tú ert heima við familjuni.
- Tvær ferðir setir eitt sóttarhaldstoymi seg í samband við teg. Tú fært ein kontaktpersón í toyminum.

**UM TÚ FÆRT SJÚKUEYÐKENNI ER SERA TÝDNINGARMIKIÐ, AT TÚ LETUR TEG KANNA**

Kontaktpersónurin í sóttarhaldstoyminum kann hjálpa tær við hesum. Um tú ikki fært fatur á kontaktpersóninum, kanst tú ringja til:

- Tín kommunulækna kl. 08–16 gerandisdagar.
- Coronalinjuna tlf. 30 40 40 kl. 10–15 gerandisdagar.
- Læknavaktina tlf. 1870 kl. 16–08 gerandisdagar, í vikuskiftum og halgidagar.

Meira kunning um sjúkueyðkenni er at finna á www.corona.fo/sjukueydkenni

**VÍS ÁBYRGD**

Tað hevur eydnast at avmarka COVID-19 í Føroyum, og tað skal halda fram. Okkara samfelag er lítið og viðbrekið, tí er umráðandi, at fyrilit framvegis verða tikin at fyribyrgja smittuspjaðing.

**EFTIR 14 DAGAR KANST TÚ FERÐAST FRÍTT Í LANDINUM, MEN MINST TIL AT FYLGJA TILMÆLUNUM FRÁ MYNDUGLEIKUNUM.**








**ONNUR VIÐKOMANDI KUNNING OG KONTAKTUPPLÝSINGAR**

Corona í Føroyum: www.corona.fo
Coronalinjan: tlf. 30 40 40 – kl. 10–15 gerandisdagar.
Landslæknin: www.landslaeknin.stps.dk
Heilsumálaráðið: www.hmr.fo